


Myrking av stjørnum gevur ábending um, at brotin ringur, ella »perluketa« er rundan um Neptun

Perluketa uttan um Neptun

Nýggjar granskingar vísa, at gongustjørnan Neptum hevur okkurt slag av ringi uttan um seg, sum Jupiter, Saturn og Uranus. Neptun er umleið 4,5 mia. km. frá sólini, og tískil er ringt at síggja hana. Enntá í stórum kikarum sæst næstan einki uttan ein lítil blágrøn skiva. Granskararnir hava eru komnir fram á ringin uttan um Neptun viðmátingum.

Við hvørt kann Neptun myrkja onkra stjørnu, sæð frá jørðini. Um gongustjørnan hevur ring, verður hann forðing fyri, at ljósið frá stjørnuni kann koma fram júst í tí løtuni, stjørnan fer aftur undir Neptun. Tá ið hon lítla løtu seinni kemur fram aftur hinumegin, kann ringurin aftur forða ljósinum nøkur sekund. Úrslitið er, at stjørnan áðrenn og aftaná myrkingina blinkar veikt.

Hetta fyribrigdi sóu stjørnufrøðingar frá stjørnukanningarstøð í Chile 22. juli 1984: Teir mettu, at teir høvdu sæð part av einum ringi, ið var umleið 76.000 km frá Neptun. Tá teir bótu saman hesi úrslitini við fyrri granskingar, komu teir fram til ta løgnu niðurstðuna, at ringurin ikki røkkur allan vegin rundan um Neptun. Partarin, ið teir sóu, var minst 100 km langur og 15 km breiður. Stjørnufrøðingarnir meta nú, at ein »perluketa« er rundan um Neptun, t.e. partur av ringi. Hendan ketan kann føra til trupulleikar fyri Voyagar 2, tá ið hann kemur hagar í august 1989. Meiningin er, at hann skal heilt út til perluketuna.

2800 ymisk mál í heiminum

Russisk

Идея использования квантовых систем для ге радиоволн оказалась весьма плодотворной и недостижимые для обычной радиотехники резу.

Burmesisk

ကြီပစ္စည်းကရိယာများ ရှိပြီးဖြင်လေသည်။ အလယ် ဝိုင်ဆု ပဂ္ဂိုလ်များအတွက် အထူးသင်တန်းများ

Grøsk

Λ'Ο 'Οδυσσεὺς καὶ οἱ σύντροφοι αὐτοῦ πλοῖα, τὰ ὁποῖα ἦσαν πλήρη λαφύρων, ἀπ Τρῳάδος, ἐπιθυμοῦντες νὰ φθάσωσιν ὅσο

Kinesisk

是被迫產生的節約燃氣所造成的後果。尤是倫敦一地，過去

Nógvastaðni í heiminum verða myndir nýttar sum skrifttekin, samsvarandi tí at talumálið upprunaliga byrjaði sum ljóðeftirlíkningar

Roknað verður við, at ímillum 2700-2800 ymisk mál finnast í heiminum — og innanfyri hvørt mál eru í nógvum førum fleiri ymisk málføri. Nógv tey flestu av hesum málunum verða tosað av sera smáum, næstan ókendum fólkasløgum. Eysturgrønlendskt verður t.d. tosað av einans 2000 fólkum og fleiri ættarbólkar í Suður-Amerika, einans upp á nøkur hundrað fólk, tosa sítt egna mál. Tað er ein løgin og áhugaverd sannroynd, at innanfyri eitt øki,sum ikki eru sínámillum skyldari enn føroyskt og kinesiskt. Harafturímóti eru til 10-13 mál, ið verða tosað av meira enn 50 mió. fólkum. Einstøk málføri av kinesiskum verða tosað av upp til 100 mió. fólkum.

Nógvar áskoðanir eru um, hvussu málini vórðu til. Serfrøðingar eru ósamdir, um øll mál eru komin av einum upprunaligum máli, sum Bíblian vil vera við í frágreiðing síni um Bábelstornið, ella um málini hava ment seg uttan samband við hvørt annað.

Serliga er tað talumálið, ið eyðkennir okkum frá djórunum. Teknmál hava menniskjurnar altið nýtt og nýta tað enn, men tað hevur víst seg, at sjimpansapur eisini kunnu læra seg teknmál. Heilin í menniskjuni er kortini nógv meira mentur enn heilin í sjimpansuni, og vísindamennininr meta, at hetta er ein av treytunum fyri at menniskjurnar duga at tosa saman. Upprunaliga varð nýtt kanska einans eitt mál ella ein skipan av ljóðum, ið øll skiltu, meðan tey búðu innfyri eitt avmarkað øki, trúliga í Afriku, har tey elstu merkini eftir menniskjum eru funnin. Næsta stig í málmenningini var, at tey byrjaðu at eftirlíkna djóraljóðum. Hetta kenna vit úr okkara tíð — kráka fær navn av ljóðinum, hon gevur frá sær, tað sama sigst vera galdandi fyri ugluna. Fyri umleið hálvari mió. árum síðan byrjaðu forfedrar okkara at breiða seg út um knøttin, og frá teirri tíð fóru ljóðini at mennast upp á ymiskar mátar. Tess longri aftur ein fer í tíðina við einum málbólki, tess sínámillum líkari eru málini. I Europa tosa vit nógv ymisk mál innan fyri høvuðsbólkarnar germanskt, romanskt og slaviskt. Men fyri einans nøkrum túsund árum síðan varð eitt mál tosað — indoeuropeiskt.

Øll mál eru sera ymisk, ikki bert orðini og málfrøðin. Útboðið av orðum í einum máli sigur nóg um samfelagsligu gongdina og menningina. Eskimoar hava t.d. yvir 20 orð fyri kava, og samar hava 11 ymisk orð fyri »svágur« — ein tann týdningarmiklasta persónin í tí samisku familjuni.



Tøkni og Vísindi

Edvard Jónsson skrivar

Skurðviðgerðir á skallum

— hjá Inka-indiánum í Suðuramerika



Hesin indiánin doyði trúliga á serstakliga kvalfullan hátt. Kanska var tað beinleiðis avleiðing av miseydnaðari skurðviðgerð

Upp ígjøgnum tíðina eru funnin fleiri hundrað, kanska fleiri túsund, skøltar av indianarum í Suður-Amerika, sum týðiliga hava gjøgnumgingið skurðviðgerð, har ein partur av skallanum varð tikin burtur. Funnin varð enntá ein skalli, í hvørjum holan eftir skurðviðgerðina var stongd við gullplátu, og viðgerðin var so væleydnað, at beinanvegin var vaksin út yvir gullplátukantin.

Viðgerðirnar vóru framdar á livandi persónar, og eingin veit, um nakað slag av doyvir varð nýtt, men helst var »offurdjórið« latið drukkið seg skitfult áðrenn skurðviðgerðina, ella tað fekk eina fitta nøgd av koka-bløðum at tyggja. Bløðini, ið innihalda kokain, vóru sera vinsæl millum inkarnar og verða brúkt sum rúsevni enn í dag í Andes-fjøllunum. Skallaviðgerð av hesum slagi má hava voldað offrinum svára pínu og liðing. Ikki er greitt, hví hesar skurðviðgerðir vórðu framdar, men roknast kann við, at tær vórðu nýttar ímóti nógvum sløgum av sjúkum, kanska fyrst og fremst ringari høvuðpínu.

Kelda: Illustreret Videnskab